## DAGSINS MEINING

# Ferðslutrygd á dagskrá

Álvarsamar ferðsluvanlukkur fáa okkum at steðga á og hugsa okkum um. Hvat kann verða gjørt fyri at minka um talið vanlukkum? Nú eru so komin nøkur hugskot fram. Tey flestu hava verið frammi áður. Hetta er tó ikki galdandi fyri uppskotið um eina serstaka skaðanevnd fyri ferðsluvanlukkur. Hetta er ivaleyst eitt skilagott hugskot, eitt uppskot, ið ivaleyst fer at kunna siga okkum nakað um, hví vanlukkur henda á vegunum. Kenna vit nakrar av orsøkunum, kann ivaleyst verða gjørt nakað við hesar serstøku orsøkir. Myndugleikarnir eiga tí at taka uppskotið um eina skaðanevnd frá leiðaranum fyri Ferðslutrygd í størsta álvara.

Men tað verður ikki nóg mikið við eini skaðanevnd fyri ferðsluvanlukkur. Henda nevnd kemur ikki inn í myndina fyrr enn vanlukkan er hend. Sjálvandi kann arbeiðið hjá eini skaðanevnd nýtast í fyribyrgingini av vanlukkum í ferðsluni. Men ein nevnd eina er ikki nóg mikið. Her má verða fylgt upp við øðrum tiltøkum, og tiltøkini mugu samskipast. Ein spurningur er ferðin og eftirlitið við ferðini. Ein annar spurningur kundi verið: eru krøvini til koyrilæruna nóg høg? Eiga vit ikki umhugsa heilt at umskipa koyrifrálæruna og geva hesari undirvísing sama status sum onnur undirvísing hevur, sum t.d. tann, ið almenna undirvísingarverkið hevur ábyrgdina av?

Ella við øðrum: átti koyrilæran ikki at verið undir somu skipan sum onnur undirvísing? Hvørji krøv eiga at verða sett til innihaldið í koyrifrálæruni? Átti t.d. ikki ein lærugrein sum sálarfrøði at verða partur av innihaldinum? Hvat við pedagogiska partinum av koyrilæruni? Hvør tryggjar koyrilærarum ta eftirútbúgving og ta dagføring av útbúgvingini, sum ein og hvør, sum virkar sum lærari, støðugt hevur tørv á? Hví skal tað kosta at taka koyrikort? Hevði tað ikki bøtt munandi um ferðslutrygdina, um koyrilæran var ókeypis, koyriskúlarnir vóru almennir og koyrilærararnir settir í fast starv hjá Mentamálaráðnum ella hjá viðkomand bygdað ella bðráðið?

Ein áhugaverdur spurningur er spurningurin um eina royndartíð fyri bilføraran. Tað er ivaleyst eitt gott hugskot við einum treytaðum koyrikortið við eini royndartíð, soleiðis sum Bjarni Djurholm, landsstýrsimaður, nevndi í SvF hóskvøldið. Hetta hevur verið nevnt áður. Men er tað rætt og skilagott bert at lata hesar treytir verða galdandi fyri ungar bilførarar? Her er nógv at hugsa um, og ferðslutrygdin er eitt hitt mest álvarsama mál í okkara tíð. Ferðsluvanlukkurnar eru ræðuligir sorgarleikir, og øll kenna vit djúpa samkenslu við teimum, sum missa, sum koma til skaða, ella sum á annan hátt verða rakt av vanlukkunum. Tað er umráðandi, at nakað verður gjørt við hesar afturvendandi óhugnaligu sorgarleikir, sum skelka og elva til so stóra sorg og neyð. Vónandi fara allar góðar kreftir nú til verka við hesum álvarsmáli.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Eitt hjartasuff

**Finnur Helmsdal**



Í samband við at danskur psykiatribussur vitjaði her á landi var stutt samrøða í morgunsending Útvarpsins við tvey starvsfólk á psykiatrisku deild. Sum onkun tíð áður, so fari eg at nýta høvi til at fegnast um tiltakið og alt annað, hesi ágrýtnu og áhugaðu starvsfólkini har úti gera fyri okkara sálarsjúku. Tað er stuttligt at uppliva hvussu til dystin fús hesi somu starvsfólk eru og hava verið, hvussu tey royna at pynta um annars ikki alt ov vøkru myndina, okkara myndugleikar hava teknað av hesum øki seinastu nógvu árini.

Tó fari eg eisini at nýta høvi til at koma við einum hjartasuffi. Eitt av starvsfólkunum málbar seg nakað soleiðis í áðurnevndu sending: "Sálarsjúka er ein sjúka, og eiga vit at síggja og fara við sálarsjúkum, sum eru tey sjúk". Viðkomandi sigur so nakað soleiðis: "Ofta verða sálarsjúk sett í bás við t.d. menningartarnað, og tað er ikki so heppið".

Ein hugsar beinanvegin: "Eru vit allíkavæl ikki komin longur"?

Um ta tíðina, tá MBF varð sett á stovn fyri gott 20 árum síðan, hoyrdist nevniliga júst sama sjónarmið frá onkrum brekbólkum: „ vit vilja ikki verða sett í bás við tey evnaveiku (sum menningartarnað tá vórðu rópt)".

Arbeiða vitvið og fyri menninskjum við serligum tørvi ella í serligari støðu, snýr tað seg m.a. um at virka fyri, at hesi menniskju so ella so gerast náttúrligur partur av samfelagnum. Tað snýr seg um at fyribyrgja, at tey verða marginaliserað, og at einsemi og ótryggleiki mynda tilveruna. Hetta er galdandi fyri øll. Eisini tey sálarsjúku. Eisini tey menningartaraðu. Tað snýr seg ikki um at hevja nakrar bólkar upp um aðrar.

Vóni tit taka mær ikki hjartasuffið illa upp, og enn eina ferð takk og góðan byrð.

# Læknin og Sandoy

**Gerhard Lognberg,**
*borgarstjóri í Skopun og løgtingslimur*



Bill Justinussen landstýrismaður, hevur nakrar viðmerkingar til tað, sum er skriva um læknarnar í Sandoy. Eg vil siga, at í løtuni hava vit góðan lækna í hvussu so er eitt hálvt ár fram.

Hetta við læknanum í Sandoy hevur verið terpa aftur og fram og kennur tú mína støðu í hesum málið: Sandoy skal hava lækna alt døgnið, eingin ivi um tað.

Hetta má verða eitt minsta krav, tí at leggja Sandoy við ongum lækna frá kl. 16 á kvøldið til kl. 8 um morgunin, og frá kl. 16 fríggjadag og til kl. 8 mánamorgum er einki minni enn ein katastrofa.

Nei Bill. Fyrst vóru konsultatiónirnar tiknar frá bygdunum og nú líður væl at taka læknarnar við. Eg skilji teg væl Bill, at tað er ringt at fáa lækna, tí tað var tað eisini áðrenn tú kom, so hesin trupuleikin kann sum so ikki bara verða tín.

Men so har frá at hoyra og síggja teg royna at rættvísgerða at eingin lækni skal verða partar av tíðini í Sandoy, tað er bæði grátuligt og láturligt.

Nei tað er einki andstøðu tos at man ger vart við at lækni skal verða í Sandoy. So sigur Bill Justinussen at tá samanum kemur hava vit góða kommulækna tænastu. Veitst tú hvat? So hevur tú lurtað illa eftir tí, sum vit hava roynt at fingið fram: tænastan í Sandoy hevur verið út av lagi.

Skilji eg teg rætt so hevur tú slept endanum, og meinar at vit í Sandoy skulu klára okkum uttan lækna.

Vónandi er tað ikki meiningin, men tak málið í álvara, so hesin trupuleikin ikki kemur aftur. Sum sakt hava vit góðan lækna sum er og eitt hálvt ár fram.

# Fótbóltsterminologi

**John Berg,**
*í Nesi Hvalba*

Nú fótbóltskappingin gongur uppá tað harðasta.

Vildi fegin fingið viðmerkingar til hesi fyribrigdi - tað veri seg málsliga, men helst best við eini tekning/mynd ?

Niðri á vøllinum ...........?
Upp á vøllin ………......?
Uppi á vøllinum ………?
Niðan á vøllin ………...?
Oman á vøllin ...……...?
Heim á vøllin ............…?

Hvussu við at vera frammi ella afturi á vøllinum - at fara fram ella aftur á vøllin?


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Nýggja bókin um Tjaldur komin



*Bjari Åkesson Filholm er hálvur føroyingur. Hann er føddur í Vestmanna í 1952, mamman er føroysk og pápin danskur. Hann arbeiðir dagliga sum bókavørur á Hjørring Bibliotek, samstundis sum eisini gevur bøkur út*

**Danska forlagið, Forlaget Nautilus, hevur givið út bókina: "Fire skibe med navnet Tjaldur", sum Bjarni Åkesson Filholm hevur skrivað. Bókin er tann triðja í røðini um føroysk ferðamannaskip**




*Nýggja bókin "Fire skibe med navnet Tjaldur" hjá Bjarna Åkesson Filholm*

BÓKAÚTGÁVA
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Bjarni Åkesson Filholm gav í 1999 út eina bók um Tjaldur, sum bleiv útseld eftir stuttari tíð. Nú er nýggjasta bókin "Fire skibe meda navnet Tjaldur" útkomin. Bókin er ikki endurprent av tí fyrru, men ein heilt nýggj bók.

Frá 1925 til 1969 vóru ferðamannaskipini, sum vórðu nevnd Tjaldur hjá Skipafelagnum Føroyar, týdningarmesta sambandi millum Føroyar og Danmark og útheimin yvirhøvur.

Í bókini er eitt innleiðandi kapittul við søguligum atliti um sambandi millum Føroyar og umheimin. Síðan verður sagt frá við góðum myndum og teksti um hesi fýra skipini og um teira lagnur.

Bókin er merkt av, at rithøvundurin er hevur stóran áhuga fyri tí, hann skrivar um. Hann greiðir eisini sera livandi frá sínum egnu upplivingum á túrum millum Føroyar og Danmark.

Tað er danska forlagið, Forlaget Nautilus, sum gevur bókina út. Forlagið bleiv stovnað í 1999 við tí endamáli at geva út bøkur um danskar ferjur og ferðamannaskip. Fyrsta bókin ið forlagið gav út var bókin Tjaldur hjá Bjarna Åkesson Filholm. Síðan eru fleiri áhugaverdar bøkur komnar frá Forlaget Nautilus.

Bókin "Fire skibe med navnet Tjaldur" er 120 blaðsíður við nógvum myndum, eisini litmyndum. Bókin er nú at fáa í bókabúðunum kring landið.




*Tjaldur og Blikur hjá Skipafelagnum liggja her saman á Asiatisk Plads í Keypmannahavn. Blikur sakk í 1963*